SOSIALURIN

Útgevari: Føroya Javnaðarflokkur

Blaðstjóri: Villi Sørensen tlf. 5479

Prent: Prentsmiðjan á Heygsbreyt tlf. 1820

»Sjalvstýrislandsstýrið« — heimastýrislógin

ALMIKIÐ róp og reyp hevur verið at hoyrt frá teimum ymisku flokkunum, sum undir einum ella øðrum heiti skíra seg fyri »sjálvstýrisflokkar«, um meira, ja, fyri so vítt eisini minni —meira sjálvstýri. Nú bar so væl í lag, at allir teir flokkar, sum rópað og skrivað hava um sjálvstýri, komu í meiraluta á tingi og myndaðu nýtt landsstýri aftaná seinasta val. Nú bar saktans til at fremja alt tað sjálvstýri, teir hava talað um, og tað er gamalt, tí allir siga seg eiga rót í sjálvstýrinum heilt aftur til 1906.

TEIR skulu sostatt verið væl fyrireikaðir, og allir sum ein til reiðar at lagt greitt og fullfíggjað uppskot á tingborð um eitt víðari sjálvstýri ella beinleiðis loysing um tað skuldi verið. Men gakk, har kom ongatíð nakað veruligt uppskot frá teimum, tí uppskotið um ymiskar broytingar í heimastýrislógini, sum var lagt á tingborð, áðrenn seinasta tingseta endaði, kann ikki metast stórvegis annarleiðis enn eitt bluff-nummar uppundir sjálvan endabrestin — okkurt skulu teir jú hava at blaka veljarunum í eyguni, tá veljast skal einaferð í heyst.

RÆTT ER TAÐ at Erlendur Patursson, sum tá var varaløgmaður, í útvarpinum kunngjørdi stevnu landsstýrisins í stjórnarskipanarmálum — eina reina og fullkomna loysingarstevnu; men longri kom tað ikki. Tað gjørdist deyðatøgn um sjálvstýrismálini. Vóru hesir sjálvstýrisflokkar so altráðir eftir at fremja meira sjálvstýri, var tað sjálvsagt, at sjálvstýrisuppskotini komu beinanvegin og ikki minst av tí, at stórur meiraluti í landsstýrinum áður hevur sagt, at tað er ógjørligt at stýra einum landi eftir heimastýrislógini. Tí var tað so mikið meira umráðandi at fáa heimastýrislógina broytta beinanvegin. Tí var tað náttúrligt, at uppskot um hetta kom á ting so skjótt sum »sjálvstýrislandsstýrið« var skipað.

HITT sokallaða »sjálvstýrislandsstýrið« sat tætt við hálvtriðja ár og situr illa løstað framvegis; men ikki ein stavur er broyttur í heimastýrislógini, ikki ein einasta yvirtøka er framd enn. Tað stendur framvegis fast, at tað sjálvstýrið, ið vit hava fingið, er vunnið av javnaðar- og sambandsmonnum. Hetta sjálvstýrið er so gott, at eitt sokalla »sjálvstýrislandsstýrið« kemur til, situr við ræðinum í hálvtriðja ár; men letst ikki um vón — grettir ikki orð um meira sjálvstýri, og var viljin so góður at fremja meira sjálvstýri, máttu teir framt tær broytingar, teir sjálvir hava sett uppskot um, áðrenn teir stungu halan millum beinini og krúpa undan ábyrgdini í úrtíð.

NORÐOYA SPARIKASSI

stovnaður 1919

Renta av innsettum peningi:

3 mánaða uppsøgn	5 % p. a.
Uttan uppsøgn	4 % p. a.
Kekk — konti	2 % p. a.

Fyri innskot við longri uppsagnartíð verða renta latin eftir seravtalu

Lán verða givin móti veð í jørð og bygningum.

Avgreiðslutíð hvønn gerandisdag kl. 10—12 og kl. 13½—15½, leygardag kl. 10—12½

Spinnið í Gøtu

tygum fáa gott tógv, og skjóta avgreiðslu.
Vit keypa óvaskaða og vaskað ull og selja øll sløg av føroyskum tógvi.

TØTINGARVIRKIÐ
v/ Ólavur Gregersen — tlf. 20 í Gøtu

pf

Skála skipasmiðja & handilsvirki

SKÁLA

Telefon Runavík 7260

Stálskipasmíð

Sleipistøð
Skipasmiðja
Mekaniskur verkstaður
Elektriskar installatiónir
Skipsútgerð
Fiskaftflutningur
Sildaútflutningur
Frystivirki
Matvørubúð
Klædnabúð
Kol


Nýmótans fiskavirki við kuldagoymslum

Skák og mát

TALVUPPGÁVA NR. 28

C. Vaughan, Ongland

(Arbejder-Skak 1950



a b c d e f g h

Mát í 2 leikum

Loysingur til talvuppgávu nr. 27

1. Rh1, Kxe4, 2.Rh5
1. —, Kxc4, 2.Rb1

ORÐIÐ

Soleiðið elskaði Gud heimin, at hann gav... Joh.3.16

Guð gav, — hann gav okkum lívið, og tað, sum lívið krevur. Hann lat meg vakna til ein nýggjan dag og gav mær kreftir til at útinna dagsins strev.



Men hoyr: Hann gav okkum son sín tann einasta; hann gav okkum sítt dýrasta og besta. Og tá ið eg nú hoyri tað aftur eina ferð enn, kann eg tá halda nakað aftur, sum er mær ov kært til at geva honum, vil eg enn fjala nakað fyri honum. Sál gev alt til Guð, tí hann eigur alt, og hann hevur givið alt til okkum. O tonk, tá ið vit høvdu gloymt hann og hansara gávu, so gav hann okkum evangelistar, sum kundu minna okkum um kærleika hansara. Teir komu og sáaðu orðið av nýggjum í hjørt uni. Sæla tíð, tá ið tey verða livandi og vermandi! Álvarsama tíð, tá ið Harrin er nær. Tá kallar hann á lærisveinar sínar, at teir skulu kalla á heim in, sum er í myrkri, og sum boðskapurin ikki náddi. Tað er sárt at bera boðskapin, tá hann verður vrakaður; men tað er gleði at bjóða Jesus til onnur, og hann verður móttikin, — tað er lukka! *P. S.*

STATENS PRÆMIEOBLIGATIONSLÅN 1948/68.

34. trækning. (Blå obligationer).

Lånet omfatter serienumrene 1—1000 og løbenumrene 1—2000 incl.

Følgende større præmier er i dag udtrukket:

200.000 kr.: serie nr. 321 løbe nr. 52
100.000 kr.: serie nr. 38 løbe nr. 969
serie nr. 77 løbe nr. 1934

50.000 kr.: serie nr. 268 løbe nr. 1771
serie nr. 508 løbe nr. 545
serie nr. 934 løbe nr. 1387

	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.		
25.000 kr.:														
serie nr.	løbe nr.													
3	1963		274	327	362	209	575	1193	916	729	943	1184		
11	798		293	1833	397	1395	851	758						
10.000 kr.:														
	37	1361	274	1794	417	940	646	91	703	405	774	1669		
	88	1867	388	1651	555	1795	658	1882	738	1581	923	1779		
	182	459	402	603	581	1741								
5.000 kr.:														
	60	1268	145	25	246	1179	492	473	643	64	915	1166		
	77	501	169	1152	373	1830	495	501	799	1435	953	1548		
33	689		83	1090	230	253	467	1009	571	813	820	1648	998	1921
56	81		108	1649	234	1108	478	146	577	968	907	1347		
1.000 kr.:														
	126	160	305	667	478	55	606	1742	762	149	877	867		
	126	257	306	825	479	972	614	177	769	632	878	634		
	132	103	310	717	488	1684	614	479	773	319	900	1321		
	142	1626	330	1655	495	1087	615	993	792	1576	901	1166		
	147	1457	335	1277	507	1240	631	1206	801	1293	919	726		
1	649		348	1177	383	65	515	538	637	290	815	330	919	1495
11	21		167	993	398	1535	541	1764	637	533	816	299	929	306
11	1622		189	1568	401	471	543	561	655	1011	823	396	931	1049
43	1915		192	1102	408	967	551	55	676	1621	824	1162	934	1017
54	1564		199	826	409	1656	555	1179	704	32	838	1337	944	565
66	50		226	1002	423	1861	563	1524	712	179	849	1413	946	1585
77	1882		253	1927	427	109	580	784	719	1639	852	1699	962	645
88	658		273	762	427	1485	586	1188	725	1704	854	728	972	1872
94	1924		275	442	441	903	596	861	753	604	866	966	992	1661
115	320		279	757	446	49	602	699	760	1149	869	41	993	1163
500 kr.:														
	99	1733	245	55	372	574	502	534	718	1138	889	554		
	105	1945	273	642	375	1564	520	644	728	1933	891	90		
	115	1787	282	620	375	1793	525	1591	760	1394	903	458		
	149	1751	285	390	382	1041	545	512	764	1466	921	503		
	155	889	299	414	404	1538	585	974	765	349	924	1559		
5	1613		168	121	311	740	415	1764	588	472	791	258	925	1553
10	1846		170	1021	331	272	422	588	590	401	793	547	951	1007
14	392		179	852	340	1115	435	1795	594	210	794	434	954	1833
42	1798		190	1850	343	1156	443	647	604	728	801	886	964	1460
50	922		194	944	344	588	445	1278	609	1226	807	1566	970	171
61	34		198	536	348	1329	454	284	611	1147	859	419	974	745
68	804		205	1541	349	1019	475	1533	665	1335	865	1075	976	1764
76	1854		211	371	359	1069	477	196	683	1968	875	1518	979	1510
86	893		214	254	360	1368	482	1890	717	1947	882	1654	981	416
89	461		230	1254	370	1337	493	1754	718	707	886	307	990	1159

Den officielle trækningsliste indeholdende samtlige 6756 præmier samt numrene på endnu ikke hævede præmier fra tidligere trækninger vil kunne købes for 30 øre i bladudsalgene fra den 15. juni d. å. **Udbetaling af præmier af alle størrelser foregår ved Danmarks Nationalbank, amtstuer** og endvidere uden for København ved **toldkasser fra og med den 16. juni d. å.** Af kontrolhensyn vil der for obligationer, på hvilke der er faldet præmier på 5000 kr. eller større beløb, og som er indleveret til amtstuer og toldkasser, hengå nogle dage mellem obligationernes indlevering og præmiernes udbetaling. Præmier, der er faldet i denne trækning, skal være hævet senest den 16. juni 1968. Efter denne dato er de forældede.

Finansministeriet, den 8. juni 1965.



Zacharias Wang er vorðin cand. scient. pol. (samfundskundskab) við Árhus universitet við 1. karakteri.

HVAT PRÁTA MENN UM...

Í VESTMANNA: Mikil spenningur er um, at Alfred Olsen fergumaður, hevur keypt bilfergu til Oyragjáarrutuna; onkur illskast sum vera mann um, at hitt almenna ikki enn hevur gjørt veruligt fergulegusamband: Vestmanna—Oyragjógv.

Í SØRVÁGI: Menn fegnast um, at farið er undir arbeiðið at viðka flogvøllin; men samstundis harmast menn um, at tað framvegis er ein fyribils flogvøllur. Sorgarleikur verður tað, um flogsambandið verður lagt aðrar leiðir enn til Vágarnar. Hetta má ikki henda siga menn!

Í LORVÍK: Menn frøða seg yvir, at arbeitt verður uppá at leingja molahøvdið við 10 metrum beint úteftir. Teir ynskja eftir, at komið verður so langt áleiðis áðrenn Ólavsøku, at høgættin ongan skaða ger. Menn fýlast á, at tað hevur gingið so strilti at fingið tað neyðuga byggitilfarið úr Havn.